# Georg er borte

(Georg er horvin, Sanna A. Dahl 2023)
Høvundur og myndprýðari: Ragnar Aalbu (NO)
Ena/ Vigmostad & Bjørke, 2021

Tilnevnd Barna-og ungdómsbókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins 2022

Søgugongd: Ein drongur saknar frensin hjá sær, Georg, sum hevur verið horvin í fleiri dagar. Saman við pápa sínum roynir hann at finna Georg. Hvar mann hann vera? Hvat mann vera hent? Hugsa tær, um Georg ikki kemur heim. Hugsa tær, um Georg er deyður! Meðan teir leita, tosa drongurin og pápin um, hvat kann vera hent Georg, sum fær drongin at hugsa nógv um lívið og deyðan.

Evni: deyði, tilvera, saknur, stúran, óró, barnasýn, djór




## Samtalur og virksemi:

### HYGG OG LES saman við teimum yngstu

**Hyggið at myndunum saman. Leitið eftir Georg og øllum teimum spennandi smálutunum í bókini.**

### TEY YNGRU

**1. Hyggið at permuni. Hvat halda tit, at bókin snýr seg um?**

**2. Georg er horvin. Hvat mann vera hent?**

**3. Hevur tú nakrantíð saknað nakran? Hvussu kendist tað?**

**4. Hvar heldur tú, Georg hevur verið? Fortel við at mála við svampi og máling ella á annan skapandi hátt.**

### MIÐLINGAR

**1. Heldur tú, at Georg hevur saknað drongin? Hví heldur tú tað?**

**2. Pápin fortelur, at tá ein er deyður, er mann burturi fyri altíð. Hvussu hevði tað verið, um eingin nakrantíð doyði?**

**3. Ímynda tær, at Georg dugir at skriva. Skriva eina lítla søgu um ævintýrið hjá Georg, hvar hann hevur verið, og hvussu hann hevur havt tað. Ger myndir til.**

### TEY STØRRU BØRNINI

**1. Hvat heldur tú um bókina? Var nakað, sum tær ikki dámdi? Var okkurt, ið var torført at skilja? Finnur tú mynstur og líkleikar til aðrar søgur?**

**2. Hygg at myndunum. Hvat heldur tú um tær? Hvat fyri huglag skapa tær? Finn síðuna, sum tær dámar best. Fortel, hvat tær dámar við hesi myndini.**

**3. Hvar heldur tú, Georg hevur verið? Nýt myndirnar í for- og baksatsinum í bókini sum íblástur til at skriva eina yrking.**

**4. Ímynda tær, at ein kann liva fleiri ymisk lív. Hvør ella hvat vart tú í tínum fyrra lívi? Og hvør vilt tú vera í tínum komandi lívi? Skriva ein tekst um hetta.**

**LESIÐ EISINI:**
**Abbi og eg og Abbi eftir Dánial Hoydal og Annika Øyrabø**

MÁLBITIN

# "Saknur"

| svenskt | danskt | norskt | íslendskt | føroyskt | grønlendskt | finskt | norðursámiskt |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Saknad** | **Savn** | **Savn** | **Söknuður** | **Saknur** | **Maqaasineq** | **Ikävä** | **Áibbašeapmi** |



Frámerkið myndir av tykkara lesiupplivingum við **#nordiskabokslukaren!**